KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks2 . FR-700 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 Fax. 410001

# Foreldragjaldið lækkar 1. januar 2017

Sum ein liður í stevnumiði býráðsins hesi seinastu fýra árini at veita smábarnafamiljum í Klaksvíkar kommunu fíggjarligan lætta, verður enn ein lækking framd av foreldragjaldinum fyri dagstovna- og dagrøktarpláss.

Henda tilgongd byrjaði í 2014, og frá 1. januar 2017 taka vit enn eitt stig á hesi leið. Sum tað framgongur av yvirlitinum niðanfyri, er talan um munandi lækking.

**Foreldragjøld um mánaðin:**

| | **2017** | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|
| Dagrøkt | **1.493** | 1.552 | 1.671 | 1.790 | 2.200 |
| Vøggustova | **1.563** | 1.693 | 1.823 | 1.953 | 2.400 |
| Barnagarð | **1.119** | 1.199 | 1.291 | 1.383 | 1.700 |

Systkinaavsláttturin verður framhaldandi 25%.

**Árligi lættin í foreldragjaldinum pr. barn hesi seinastu fýra árini:**

| | **Lætti pr. barn um árið** | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagrøkt | **7.777** | 16.423 | 17.072 | 18.381 | 19.690 | 24.200 |
| Vøggustova | **10.044** | 18.756 | 20.316 | 21.876 | 23.436 | 28.800 |
| Barnagarð | **6.972** | 13.428 | 14.388 | 15.492 | 16.596 | 20.400 |

Nevnast skal, at hesar lækkingar av foreldragjaldinum verða fíggjaðar við serstakari játtan frá Klaksvíkar Býráð, og hetta fær sostatt onga ávirkan á fíggjarætlanirnar hjá stovnunum, og børnini fáa sama góða tilboð sum frammanundan.

Sagt verður frá hesum.

*Vinarliga*

*Jógvan Skorheim*
*Borgarstjóri*

*Sigrun Vágstún*
*Barnaansingarsamskipari*